

## Smyrsl sum brennur húðina

At smyrsl kann gera seg inn á húðina og gera, at tú brennist á øðrum stigi, sum tað verður rópt, er hin 28 ára gamla norska gentan, Cathrina V. Svendsen, eitt prógv um. Ætlanin hjá Cathrinu og fleiri øðrum var at gera mammu sína ovfarna við at skipa fyri eini halloween-veitslu. Hon hevði keypt sær hvíta og svarta sminku av merkinum "character makeup kit". Sminkan er framleidd í Kina. - Eftir at eg hevði lagt sminkuna á, merkti eg, at tað fór at skriða í andlitinum – júst, sum tá tú hevur lagt ov nógv á. Sum kvøldið leið, byrjaði tað eisini rættiliga at svíða í andlitinum. Tá Cathrina tók sminkuna av aftur, var hon ikki fyrireikað at síggja tað, hon sá í spegilinum. Hetta var ógvuliga óbehagiligt, og eg vil ávara onnur ímóti at brúka hesa sminku. Cathrina V. Svendsen hevur áður arbeitt sum húðrøktari og hevur roynt nógva ymiska sminku. Hon hevur tó ongantíð áður lagt til merkis, at hon var ovurviðkvom fyri sminku. Stjórin í handlinum, har Cathrina keypti sminkuna, sigur, at tey "testa" allar slíkar vørur, sum handilin selir, og sambært frágreiðingum, vit hava, er umtalaða sminkan góðkend. - Vit hava heldur ikki fingið nakrar afturmeldingar um, at henda sminka hevur elvt øðrum trupulleikar, sigur hann. Cathrina V. Svendsen, sum fekk eina brenning á øðrum stigi, sigur, at á pakkanum, har sminkan var í, er klistraður ein hvítur seðil, og á honum er ein ávaring um, at børn undir 14 ár helst ikki skulu brúka hetta smyrsl.

# Stúra fyri at 10. flokkur í Havn verður jólatrøll



*Sjáldsama nógvir áhoyrarar vóru á býráðsfundinum í Havn í gjárkvøldið. Tað vóru fyri tað mesta lærarar, næmingar og skúlastýrislimir í Kommunuskúlanum sum vóru forvitin at vita, høvrja lagnu ætlanin fekk at samskipa allan 10. Flokk í kommununi í ein depil*

**Býráðið í Havn má nú viðgerða illa umstrídda málið um at leggja allan 10. flokkarnar í kommununi saman í ein skúla av nýggjum og nú skal arbeiðast óluksáliga skjótt fyri at málið ikki skal detta niðurfyri**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Málið um at leggja 10. flokkarnar í Tórshavnar Kommunu saman, má ikki verða jólatrøll.

Tað vóru býráðslimirnir í Havn samdir um á býráðsfundinum í gjárkvøldið.

Men hinvegin er tað ivingarsamt um teir eru samdir um so nógv annað í hesum máli.

Tórshavnar Býráð hevur nú í næstan fýra ár arbeitt við eini ætlan um at broyta 10 flokk í kommuni fyri at gera hann meiri lokkandi.

Í hesum sambandi var ein spurningur um hann skuldi skipast í eina eind, ella í fleiri eindir.

### Ein depil

Fyri at útgreina spurningin, varð ein arbeiðsbólkur settur at viðgera málið.

Ein stórur meirilutin í arbeiðsbólkinum heldur, at allir 10. flokkar í Kommunini skulu savnast í ein depil, sum skal geva teimum, ið taka av tilboðnum, eitt spennandi og fjølbroytt skúlaár, har tey koma at hitta nýggjar floksfelagar og lærarar og leggja lunnarundir framtíðarlesnað og framtíðaryrki.

Men bólkurin legði dent á, at depilin skal ikki verða partur av einum øðrum skúla, men skal verða ein sjálvstøðugur skúli við egnari leiðslu og lærarum.

Tí verður neyðugt at seta skúlaleiðara og ein varaskúlaleiðara, skrivstovufólk og 10-12 lærarar, sum burturav undirvísa í 10. flokki.

Men ein minniluti, sum var ein lærari í Kommunuskúlanum, heldur, at 10. flokkarnir skulu skipast í tveir deplar, ein í Kommunuskúlanum og ein í Eysturskúlanum. Næmingarnir, ið ganga í Argja skúla og í Venjingarskúlanum, skulu so sjálvir gera av, hvønn depil teir velja.

Minnilurtin heldur, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir ikki verða miðsavnaðir í eina eftir føroyskum viðurskiftum ov stóra eind, tí tá er vandi fyri, at menningin og fjølbroytnið í skipanini ikki verða tryggjað nóg væl.

Eftir ætlan skuldi 10. flokkur umskipast frá skúlaárinum 2008/2009.

Annars fekk tilmælið frá meirilutanum um ein felags 10. flokk, góða undirtøku í umsitingini hjá býráðnum og 10 av teimum 11 skúlastýrunum í kommununi eru eisii samd um, at hetta er rætta leiðin.

Tað endaði við, at í mars í fjør samtykti býráðið einmælt at 10. flokkur skuldi skipast sum ein felags eind frá skúlaárinum 2010/2011.

### Jólatrøll

Tað er ongin loyna, at í Kommunuskúlanum hava tey verið hart ímóti at skipa allan 10. flokk í ein depil, tí tey halda, at hann skal skipast í tvær eindir, har annar skal vera í Kommunuskúlanum.

Og nú hevur so Anfinn Brekkstein biðið um at fáa málið fyri aftur býráðið av nýggjum, tí hann sigur, at næstan helvtin av býráðslimunum eru nýggir í býráðnum síðani samtyktin varð gjørd og hann heldur, at tað er ikki vist, at meiriluti framvegis er í býráðnum fyri at skipa allan 10. flokk í ein depil.

Málið varð fyri aftur í býráðnum í gjárkvøldið og har var semja um at beina málið í fíggjarnevndina hjá býráðnum til víðari viðgerð.

Men tað varð gjørt greitt, at fíggjarnevndin mátti arbeiða skjótt og leggja málið fyri býráðið aftur á næsta fundi, sum verður 17. desember, tí á nýggjárinum fellur tað burtur og so skal øll viðgerðin verða av nýggjum.

Orsøkin til, at tað nú skal aftur í nevnd er, at mentamálaráðið hevur boðað frá, at tað verður ikki góðkent, at allur 10. flokkur í kommununi verður lagdur í ein sjálvstøðugan depil við egnari leiðslu og egnum lærarum, soleiðis sum fortreytin fyri býráðssamtyktini var.

- Sostatt er fortreytin fyri býráðssamyktini burturdottin og tí má málið viðgerast av nýggjum í nevnd, segði Jan Christiansen, býráðslimur.

Heðin Mortensen segði, at málið skuldi í fíggjarnevndina, tí verður tað ikki góðtikið at skipa allan 10. flokk í ein, fer tað at hava fíggjarligar avleiðingar fyri næsta fíggjarár og tað má fíggjarnevndin viðgera.

Og so varð, men borgarstjórin lovaði, at málið skuldi ikki verða jólatrøll, men skuldi fyri aftur býráðið 17. desember.

# Skúlarnir í Havn skulu kappast um næmingarnar

**- Skúlarnir í Havn eiga at vera í kapping um næmingarnar í 10. flokki, heldur Annfinn Brekkstein, býráðslimur í Havn**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað einasta rætta er, at kapping verður ímillum skúlarnar í Havn um at fáa næmingar í 10. flokk.

Tað heldur Annfinn Brekkstein, býráðslimur í Havn.

Hóast býráðið hevur samtykt, at 10. flokkur í Havn skuldi skipast savnast í eina eind, hevur Annfinn Brekkstein biðið um at fáa málið fyri býráðið einaferð afturat.

Sum tað sæst í hinari greinini, var tann viðgerðin í gjárkvøldið.

Annfinn Brekkstein sigur, at býráðið samtykti at savna 10. flokk í ein stóran depil útfrá tí, at talan skuldi vera um ein sjálvstøðugan depil við egnari leiðslu og lærarum, ið bert undirvístu 10. flokki Hendan fortreytin er ikki til staðar í dag, staðfestir hann. Hann sipar til, at Mentamálaráðið vil ikki góðtaka, at ein sjálvstøðugur skúli verður skipaður til 10. flokk við egnari leiðslu

### Ov víðgongt

Á býráðsfundinum í gjárkvøldið helt Annfinn Brekkstein, at tað var alt ov víðgongd at fara úr fýra skúlum, niður í ein í einum høggi.

- Í dag hava vit ein sera vælvirkandi 10. flokk í Kommunuskúlanum og hví broyta nakað, sum virkar væl? At flyta góðar 80 næmingar úr Kommunuskúlanum fær harafturat eina alt ov stóra neiliga ávirkan á skúlan, bæði hvat viðvíkur læraratímum, kt-tímum, sertímum og bókasavnstímum

Samstundis fær minkaða næmingatalið ávirkan á námsfrøðiliga arbeiðið í skúlanum við tað, at lærugreinakervið verður ikki fult útbygt og tí fær fakliga dygdin skot fyri bógvin.

Verður 10. flokkur fluttur úr Kommunuskúlanum, fer tað at merkja, at eini 10 lærarastørv vera færri á skúlanum.

- Umframt minkað pulstímatal fær skúlin eisini minni tímar til eitt nú bókasavn, serundirvísing, sjúkravikartímar, leiðsla, KT, skúlavegleiðing, rættingarniðurskurð o.a..

### Framskygdur

Eftir hansara tykki er Kommunuskúlin ein góður framskygdur og vælvirkandi skúli.

- Stórur dentur verður lagdur á djúphugsni og sjálvstøðugt arbeiði, eisini er betri skipað umsorgan og ráðgeving til næmingarnar. Skúlin bjóðar fram nýggjar lærugreinar, so sum spanskt, umframt undirvísing í enskum, í samstarvi við lærda hákúlan í Cambrigde. Eisini bjóðar skúlin fram handaligu lærugreinarnar í samstarvi við Tekniska skúla.

- Hetta er ein sólskinssøga og hevur ført við sær, at næmingar eru komnir frá øðrum skúlum í Kommunuskúlan í 10. flokk.

Tí vil hann hava, at 10. flokkur í Havn verður skipaður í tveir deplar, har næmingar frítt kunna velja í millum Tórshavnar Kommunuskúla og Eysturskúlan.

Og sum tað sæst í hinari greinini, fer málið nú í fíggjarnevndina hjá býráðnum til viðgerðar einaferð afturat.